almannaverkið

Almanna- og Heilsumálaráðið
Eirargarður 2
100 Tórshavn

Tórshavn, tann: 9. februar 2026
J.nr.: 600.K04-0043/26-17
(at tilskila í svari)

Tygara skriv.:

Viðgjørt: Janus Hentze í Stórustovu

Viðv. uppskoti til løgtingslóg um leigustuðul

Almannaverkið hevur tann 15. januar 2026 móttikið uppskot til løgtingslóg um leigustuðul til viðmerkingar.

Almannaverkið skal viðmerkja, at ætlanin er, at leigustuðul ikki skal ávirka rættin til fyribils uppihaldsveiting ella rætt til familjuískoyti. Almannaverkið mælir til, at hetta eisini verður galdandi fyri tey, sum fáa arbeiðsbúgving, og tískil er neyðugt at gera broytingar í § 12, stk. 6 í lóg um arbeiðsfremjandi tiltøk.

Møguliga kann umhugsast at gera broytingar í bæði Almannalógini og lóg um arbeiðsfremjandi tiltøk, soleiðis at rentustuðul ikki skal verða drigin av veitingunum, sum gjørt verður í dag. Eitt av endamálunum við lóg um leigustuðul er, at bústaðarmarknaðurin er skeiklaður og vendir sosialt skeivt, av tí at tað bert eru tey, ið fáa játtað bústaðarlán, ið fáa rentustuðul. Heimildin at draga rentustuðul frá uppihaldsveitingum er í § 21 í Almannalógini og § 12, stk. 6 í lóg um arbeiðsfremjandi tiltøk. Hetta er staðfest í kæruavgerðum frá Kærustovninum.

Sum Almannaverkið skilir, so verður leigustuðul íroknaður, um søkt verður um stakútreiðslur eftir § 19 í Almannalógini og § 12 í Almannapensjónslógini. Er hetta tilætlað? Hetta fer helst at hava við sær, at færri fara at fáa stuðul til stakútreiðslur, og tí verður teirra fíggjarliga støða møguliga ikki betri av hesi lóg. Mælt verður til at gera tillagingar í kunngerð um persónliga viðbót sambært Almannapensjónslógini og áseta í kunngerð um stakútreiðslur sambært § 19 í Almannalógini um, at leigustuðul ikki er at rokna sum inntøka í eini tørvsmeting.

Í uppskotinum verður víst til § 15 í Almannalógini, sum í serligum føri heimilar at veita persóni, ið fær fyribils ella varandi uppihaldsveiting, stuðul til høgar bústaðarútreiðslur. Somuleiðis verður eisini víst á, at pensjónistur kann fáa stuðul til bústaðarútreiðslur eftir § 12 í Almannapensjónslógini. Víst verður á, at persónur, sum fær veiting eftir § 12, stk. 1, § 13 a, stk. 1 og § 14, stk. 1, nr. 1 í lóg um arbeiðsfremjandi tiltøk eisini í serligum førum kann fáa fíggjarligt ískoyti til bústaðarútreiðslur. Spurningurin í hesum føri er, um ískoytið til bústaðarútreiðslur sambært nevndu lógum skal verða partur av inntøkuni eftir § 5 í uppskotinum, ið vísir til § 7 í lóg um familjuískoyti. Um so er, verður mett, at hetta kemur undir § 7, stk. 3. Skal leigustuðulin ikki verða íroknaður inntøkuna, er neyðugt at áseta hetta í undantaksregluna í § 7, stk. 3, 2. pkt. Her skal leggjast aftrat, at í mun til uppskotið um leigustuðul, har stuðul verður veittur til sjálva húsaleiguna, verður ljós og hiti roknað uppí bústaðarútreiðsluna, sambært kunngerð um ískoyti til høgar bústaðarútreiðslur.

Mælt verður til at áseta í lógina, at leigustuðul verður veittur til leiguna, og ikki til streym, hita o.t. heldur enn at tað bert framgongur av viðmerkingunum.

Vegna Almannaverkið

Janus H. í Stórustovu
fulltrúi